# De hellige mænd i Miðflokken

LEIF JACOBSEN,

Eiði

Det huer sikkert ikke Jenis av Rana og de andre hellige mænd i Miðflokken, at deres gentagne fokusering på homoseksuelle og religion i bund og grund ikke adskiller sig meget fra nogle af de farligste diktaturer i det 20. århundrede. Med hensyn til familieværdier og seksualitet er der ikke stor forskel på religiøst fundamentalistiske regeringer, fascisme og stalinisme. Hvad enten det var Moderland, Faderland eller Kristenland, gik det samme strenge budskab om intolerance igen hos dem.

Religiøse konservative gennem historien, og faktisk også i nutiden, brugte staten, som et tvangsmiddel for at tvinge deres version af en samvittighed ned over andre mennesker. Selvom kun en tredjedel sædvanligvis har tilbøjelighed til at være socialt konservative, gør det ingen forskel for dem, som er besat af at ville tvinge deres moral på alle andre for deres eget bedste. Hermed siger jeg ikke, at fundamentalister og andre religiøse ekstremister er nazister eller stalinister, men, at de har meget lignende synspunkter vedrørende deres "familieværdier" og seksuelle spørgsmål og anvender et fælles sprog i deres standpunkter og propaganda. De repræsenterer en tilsvarende fare for de frie samfund, som de altid har gjort gennem hele den vestlige historie.

Det er af den samme grund, og temmelig ironisk, at mange konservative har skabt ordet "islamfascist" til at beskrive islamisk religiøse fundamentalister. Men begge religioner har en fundamentalistisk gren, som angriber modernitet og sekularisme. Yderliggående islamister ønsker at holde de samme kræfter af vestlig modernitet nede, som kristne ekstremister gør. I FN ser vi islamiske lande, den katolske kirke og protestantiske fundamentalister på den samme side i spørgsmål som videnskab, samfund, modernitet og sekularisme.

Det kan overraske mange, at hårdkogte kommunister også var hårdkogte konservative med hensyn til familiespørgsmål og seksualitet. Det er ekstremismens natur at indføje yderliggående meninger på disse spørgsmål i statens politik. Svarene på dette perverse miks af despoti og familieværdier ligger i religionens og nationalismens natur. Det er ikke et spørgsmål om venstre eller højre, fordi social konservatisme kan findes i begge, som værktøjer for staten. Social konservatisme, både religiøs og sekulær, når den er forbundet med nationalisme og er blevet statens politik, har næsten altid forvandlet sig en fjende af tolerance og frihed. Faktisk har socialt konservative, ledet af kristne konservative, bekæmpet eller været imod religiøs forskellighed, religiøs lighed, ophævelse af slaveriet, kvindernes valgret, ophævelse af raceadskillelse, ikke raceopdelt militær, ikke raceopdelte skoler, blandede ægteskaber, respekt og lighed for jøder, sortes ret til at stemme (i USA), ligestillingslove, kvinder i ledelser, arbejdende kvinder, seksualundervisning, familieplanlægning, fødselskontrol, kondomer, homoseksuelles rettigheder og en mængde andre. Det var humanister, både religiøse og sekulære, som gik sammen for at vinde fortidens rettighedsbevægelser. Sådan er det tilfældet for tiden med hensyn til homoseksuelle og familieplanlægningsrettigheder.

Fri os for de hellige mænds snæversyn.

# "Tænastu"støðið hjá Atlantic

**Stuttsøga eftir**

**Jón Næs**
**Jan B. Olsen**
**Regin Joensen**

ið vóru so hepnir, at teir ikki vórðu settir á bíðilistan til einasta flogfari úr Keypmannahavn til Føroya, seint leygardagin 17-03-2007

Samrøða millum flogskipara, hereftir nevndur F, og stýrimann, hereftir nevndur S, á einum Boeing 747 sum er á veg avstað frá eini floghavn í Evropa, men fær boð frá torninum at steðga á taxibreytini eina løtu, tí at onnur flogfør eru við at lenda. Fyrsta flogfarið lendir, og fer fram við gronini á stóra flogfarinum, teir sita og skoða hetta, tosa um snið og litir, vanligt túnatos. Teir fáa at vita at trý flogfør koma afturat. Knappliga síggja teir okkurt fara strúkandi framvið, sum nóg illa røkkur so mikið upp, at til ber at síggja at talan er um eitt flogfar.

S: Hvat ólukkan var hatta, hasar havi eg ikki sæð fyrr?

F: Á hatta, hattar er eitt flogfar úr Føroyum, Arctic, Atlantic ella okkurt sovorðið.

S: Jamen, hava teir verið her fyrr?

F: Nei, men teir liggja og fisa runt millum lendingarhjólini hjá teimum ordiligu feløgunum ymsastaðni í tí stóru verð, tí teir vilja so ógvuliga fegnir teljast millum teir stóru.

S: So, ber tað til?, kappingin er jú nokk so hørð, og við hasum gomlu maskinunum, sum eru dýrar í rakstri, kann tað ikki verða lætt at fáa endarnar at møtast til slíkar ferðir.

F: Jú, teir hava eina "fasta" rutu millum Føroyar og Danmark sum teir mjólka.

S: Ja, men hvussu gera teir so, tá ið teir fáa bíleggingar til hesar chartertúrarnar?

F: So broyta teir bara vanligu ferðaætlanina millum FO og DK, ella leggja túrar burtur ímillum.

S: Jú men, kundarnir góðtaka sjálvandi ikki tað.

F: Kundarnir hava einki annað væl, har er onki annað felag á rutuni.

S: OK, so seta teir bara prísin nóg høgan á rutuni millum FO og DK

F: Ja, Men í Føroyum lýsa teir ofta við bíligum túrum.

S: Tað hevði eg ikki tímað um eg var einsamallur á eini rutu.

F: Nei, sjálvandi ikki, men hetta gera teir fyri at føroyingarnir skulu halda, at tað finnast bíligar ferðir, og at onnur feløg skulu halda seg burtur. Tað ber sjálvandi ikki til at keypa ein bíligan ferðaseðil, um ein fer inn á netbókingina, er alt bíligt sjálvandi uppselt eitt ár fram.

S: Jamen hvat sigur eigarin av felagnum til tað.

F: Landið eigur felagið, teir halda væl til standa, og hava enntá givið felagnum herðaklapp fyri at flúgva so nógvastaðni, hvar aðrir ikki fáa endarnar at møtast. At orkan á føroyarutuni ikki er nøktandi, taka teir ikki so tungt ella vita teir ikki. Teir eru tryggjaðir pláss, so at teir ikki skula blanda seg í raksturin.

S: Hvar liggja Føroyar annars, eru tær ikki onkustaðni langt úti í Atlantshavinum, eg meini, er hatta flogfarið egnað at flúgva so langt?

F: Ikki altíð, men so millumlenda teir bara í Stavangeri á vegnum fyri at hava nokk av brennievni um líkindi ikki skuldi verið at lent í Føroyum.

S: Á, nú minnist eg hvar eg havi hoyrt um Føroyar, har er okkurt við eini visjón um at tað skal verða heimsins besta land at búgva í í 2015 ella so.

F: Ja tað passar, og tað er at vóna fyri føroyingar at hetta verður veruleiki, tí teir fara nokk at aftra seg við at fara av landinum at ferðast ella til arbeiðis, tá tað er so ósikkurt nær ella um ein sleppur heim aftur. Arbeiðsgevarar aðrastaðni eru farnir at gera vart við, at føroyingarnir eru við at blíva ov dýrir at hava í arbeiði, av tí at teir ov ofta standa á bíðilista, bæði út og heim.

S: Hattar ljóðar sum ein rættilig røvarasøga, hatta kann ikki bera til

F: Jú, so galið er tað, sjálvt um føroya fólk hevur tikið sera væl ímóti flogfelagnum og stuðla tí, so leggur leiðslan onki í tað, men fóðra tey bara við onkrum tvætli, sum um tey eru heiladeyð og ikki duga at hugsa sjálvi, og so koyra teir víðari.

S: Hattar ljóðar rættiliga óhugnaligt, at tað ber til at fara so við kundunum.

F: Ja, sjálvt un ferðafólkatalið veksur støðugt, so minkar túratalið. Fyri at blíðka tey sum hava staðið á bíðilista í Keypmannahavn, ella ikki sleppa heim sama kvøld tey koma til Føroya, tí tann einasti túrurin tann dagin er so seint, so verður bara skonkt dúgliga umborð. Tað sær út til at virka í flestu førum.

S: Ja summi feløg hava tað strævi, og mugu veruliga hugsa um, hvat kundin vil hava, meðan onnur bara kunna siga við kundan at hettar er tað vit hava. Passar tað ikki tær, er tað bara keðiligt.

F: Ja, ójavnt er. Ná, men tornið sigur at nú er klárt at fara.

Stóra flogfarið koyrir út á flogbreytina, setur ferð á, fer upp frá vøllinum, hjólini verða tikin inn. Á veg upp gjøgnum skýggini sita tveir menn frammi í stýrhúsinum og droyma um, hvussu gott tað kundi verið at flogið upp á Føroyar og rætt og slætt passað sær dagin sum einum lysti, alt eftir um heystfjøllini skula gangast ella havhestaungarnir eru fyri, og ikki verið noyddir at tilpassa seg eftir krøvum frá nøkrum ónøgdum kundum, tí hvat kunna kundarnir gera tá tað bara er eitt felag?

TAKE IT OR LEAVE IT.

# Ættargranskingarfelagið KT Slekt hevur havt aðalfund

**ÆTTARGRANSKING**

*Tíðindaskriv*



Tveir nevndarlimir Randi Á. Jakobsen og Hans Suni Jensen stóðu fyri vali. Bæði blivu afturvald. Umfram tey sita Gøran Wennerstrøm, formaður, Sofus Johannesen og Steinbjørn í Dali eisini í nevndini.

Limatalið hjá felagnum veksur støðugt. Við árslok í 2006 vóru 525 limir. Av teimum eru eini 87 uttanlands úr 9 ymiskum londum.

Eftir aðalfundin helt Max Weihe sera áhugaverdan fyrilestur um Selatrað.

Í felagnum KT Slekt møtast limirnir bert einaferð um árið, og tað er á árliga aðalfundinum. Dagliga samskifta limirnir bert heimasíðuna HYPERLINK "http://www.genealogi.fo" www.genealogi.fo, sum er sera vælumtókt. Kjaktorgið og tær innskrivaðu fólkateljingarnar eru best umtóktar av teimum út við 200 dagliga vitjanunum á heimasíðuni.

Á heimasíðuni eru millum annað fleiri enn 60.000 nøvn úr fólkateljingum frá 1801 og frameftir, ið limir felagsins kunnu leita í. Tað gongur støðugt framá at skriva fólkateljingar inn. Felagið sóknast tó eftir fólki at skriva inn fólkateljingarnar serliga úr norð–oyggjunum.

Felagið arbeiðir eisini við at skráseta allar kirkjugarðar og gravir í Føroyum. Nakað av tilfari er longu tøkt á heimasíðuni. Onkrar kommunur eru sera trekar at lata upplýsingar um kirkjugarðar og vísa til at hetta eru eymar upplýsingar. Felagið meinar at upplýsingar um kirkjugarðar, til ættargranskingar endamál, ikki er í stríð við nakra lóg.

# Bjarti Thomsen formaður í Føroya Væl

## Nevndin í veljarafelag Sambandsfloksins í Suðurstreymi, hevur skipað seg

**POLITIKKUR**

*Tíðindaskriv*

Á aðalfundinum 19. februar 2007 var nýggj nevnd vald og sambært viðtøkum felagsins, skal nevndin skipa seg í seinasta lagi 3 vikur eftir aðalfundin.

14. mars 2007 var nevndarfundur, og nevndin skipaði seg við Bjarta Thomsen sum formanni. Annars sær nevndin soleiðis út:

Bjarti Thomsen, formaður
Hans Albert Hansen, næstformaður
Annfinn Brekkstein, kassameistari
Líggjas Høgnesen, skrivari
Jakob Holm, nevndarlimur
Varalimir eru Janus Djurhuus og Maria Lava

Løgtingsval stendur fyri framman, og nevndin hevur sett sær fyri at seta ferð á arbeiði við valevnislistanum fyri Suðurstreym. Nevndin ásannar, eins og aðalfundurin, at ov fáar kvinnur eru á valevnislistanum hjá Sambandsflokkinum, og miðað verður ímóti at kynini verða javnari umboðað.

Nevndin fer at arbeiða fyri, at Sambandsflokkurin gerst størsti flokkur í Suðurstreymi. Nevndin er samd um, at ein sterkur Sambandsflokkur í eini komandi samgongu fer at merkjast aftur í friði á politiska víðvøllinum, og at góða sambandið millum Føroyar, Grønland og Danmark verður varðveitt.

Somuleiðis má Suðurstreymur hava umboðan aftur í landsstýrinum. Nevndin heldur, at mál av týdningi fyri høvuðstaðarøkið ikki í nóg stóran mun vera røkt.

Nevndin ásannar kortini, at sitandi landsstýrismennnir í fíggjarmálum og í fiskivinnumálum hava gjørt eitt gott arbeiði til gagns fyri Føroyar.